VB-B36 1-1 (1-0):

# John bjargaði B36-vónunum

**Við einum javnleiki í Vági fekk B36 í øllum førum kensluna av, at teir fingu okkurt burturúr eini truplari uppgávu. VB man hinvegin iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at halda fast í oddinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*B36 var nakað umskipað hesaferð, og tað merkti millum annað, at Allan Mørkøre nú byrjaði inni á høgra bakki*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Tað var eitt B36-lið í mest sum kreppulíknandi støðu, sum fór til Vágs um vikuskiftið.

Talan var um triðja dystin á rað móti einum av oddaliðunum, og við tapum í teimum báðum undanfarnu dystunum, var árstalsfelagið skramblað av tindunum og niður í tað, sum í besta føri kann rópast miðalmát.

Tí er einki at ivast í, at tað stóð nógv á leikarunum, tá dysturin í Vági byrjaði, og tað tóktist eisini greitt, at teir hesaferð ætlaðu at gera nakað ítøkiligt fyri at venda gongdini.

Og fyrstu góðu løtuna vóru tað eisini gestirnir, sum vóru omaná. Teir vunnu nógvar nærdystir á miðvøllinum, og einstakar ferðir gjørdist talan eisini um heilt vandamiklar støður, sum kundu borið mál við sær. Eitt nú tá Áki Mørk gjørdist leysur og lobbaði upp um Bjarna í VB-málinum, men hesin seinni kundi dragan andan nakað lættari, tá tvørtræið bjargaði hesum.

Og so hendi tað, sum so ofta rakar eitt lið í mótráki. VB hevði hóast alt verið væl við allan dystin, og eisini teir høvdu havt nakrar møguleikar, sum Tróndur Vatnhamar tók sær av, men tað fekk hann ikki tíggju minuttir undan steðginum. Kanska var vinkulin hjá Kulic nakað spískur, men hann rakti bóltin bæði hart og reint, og stóð 1-0.

### VB kundi avgjørt

Ikki óvæntað, so tók hetta nakað av luftini úr B36-liðnum, og teir høvdu hampuliga leingi ilt við at koma fyri seg.

Seinna umfarið hevði VB fyri tað mesta greiða yvirvág í spæli, og eisini spurdust fleiri møguleikar burturúr, sum ein væl spælandi Tróndur Vatnhamar tó megnaði at taka sær av.

Og spakuliga fekk B36 aftur blást luft í ballónina. Seinasta góða korterið nærkaðust teir alt meira VB-málinum, og fáar minuttir undan dystarloki eydnaðist teimum at fáa javnleikin í hús.

Bólturin varð spældur upp í høgru síðu, og tá innleggið kom var eingin vágbingar at ansa John Petersen, og hetta lat vandamikli harrin sær ikki siga tvær ferðir.

### Sálarligan týdning

Hjá VB mundi tað kennast tungt, at teir soleiðis á stokkinum skuldu missa tvey stig, sum teir harðliga hava tørv á, um teir skulu fylgja við í oddastríðnum. Ein sigur hesaferð vildi eisini borið við sær, at teir høvdu lagt seg ájavnar við HB á øðrum plássi, en tann møguleikin má so bíða í øllum førum eina viku afturat.

Hjá B36 kundi eitt stig heldur ikki lyfta teir tað heilt stóra, men hinvegin er einki at ivast í, at sálarliga kann hetta hava sera stóran týdning. Undan hesum var liðið sum nevnt dumpað tvær ferðir á rað ímóti oddaliðum, og enn eitt tap her vildi næstan merkt eitt farvæl til allar dreymar um heiðursmerki, longu áðrenn kappingin var komin í helvt.

Enn er talan um nøkur stig upp til oddin, men við tveimum dystum á rað móti teimum báðum niðastu liðunum, kann tað skjótt vera, at árstalsfelagið fer at ota seg nakað uppeftir.

## FAKTA UM DYSTIN

**VB – B36 1-1 (1-0)**
1-0 Milan Kulic, 35
1-1 John Petersen, 86
**VB:** Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Eyðun Jacobsen, Mikael í Lágabø, Jákup Olsen – Palli Augustinussen, Jón Pauli Olsen, Milan Kulic, Símun Samuelsen – Birgir Jørgensen, Dan Djurhuus.
**B36:** Tróndur Vatnhamar – Allan Mørkøre, Jóhannus Joensen, Pól Thorsteinsson (Klæmint Matrasn, 72.), Arnbjørn Danielsen (Jens Erik Rasmussen, 66.) – Bárður Mortansson, Kenneth Jacobsen, John Petersen, Niels Joensen, Jens Kr. Hansen (Alex dos Santos, 56.) – Áki Mørk
**Gult kort:** Jákup Olsen, 13., Dan Djurhuus, 32. , Símun Samuelsen, 89., Allan Mørkøre, 33., Bárður Mortansson, 77.
**Dómari:** Eiler Rasmussen

## Skovdahl hugdi

Millum áskoðararnar í Gundadali var venjarin hjá danska Frem, Ebbe Skovdahl.

Hóast Frem í fjør flutti niður úr donsku superliguni, so er einki at ivast í, at Skovdahl er millum allar fremstu venjararnar í landinum, og lítið er at ivast í, at ørindi hansara í Føroyum hava verið at sýnað onkran føroyskan leikara, sum hann hevur í kikaranum.

Hvørki Skovdahl ella Jákup í Stórustovu, sum var síðumaður hansara í Gundadali, vilja tó siga nakað konkret um vitjanina, annað enn at hetta var fyri at kunna seg um støðið á føroyskum fótbólti.

Men tað er lítil ivi um, at Jákup á Borg var leikarin, sum danski venjarin fyrst og fremst vildi síggja. Jákup var í vár í Odense í nakrar mánaðir, og hóast leigusáttmálin har ikki varð konverteraður til eina meira varandi loysn, so sýndu fleiri onnur feløg áhuga fyri føroyska landsliðsleikaranum.

Eitt av hesum segðist vera Frem, sum eisini hevur tveir aðrar ungar HB-leikarar í hópinum. Og við føroyavitjanini hevur venjarin so eisini sýnt, at teir meina tað í álvara.

Og at onnur feløg eisini eru eftir Jákupi, er heldur eingin ivi um. So spurningurin tykist í løtuni vera, hvørt Jákup fer at spæla í HB alt kappingarárið, ella um talan verður um enn eitt skifti longu í summarsteðginum.

**-jm**

## Zidane heiðraði Barthez

Dagsins franskmaður í Portugal sunnukvøldið var Zinedine Zidane, sum skoraði bæði tey fronsku málini innanfyri 133 sekund. Hann var tó sum vanligt lítillátin eftir dystin, og helt, at málverjin átti stóra lutin í sigrinum.

– Barthez gjørdi munin, tí hann bjargaði brotssparkinum, og hann gav okkum møguleikan at vinna dystin, segði Zidane.

– Tað eru dystir sum hesir sum skapa rætta liðandan. Tað gekk ikki eftir vild hjá okkum, men vit kláraðu at vinna hóast tað, segði hann.

## Venjarin errin av sínum monnum

Sveisiski venjarin Kobi Kuhn var fegin um, at hansara spælarar kláraðu at spæla javnleik, hóast teir spældu við 10 monnum í næstan ein hálvan dystin. Hóast yvirvágini í spælarum kláraði Kroatia ikki at fáa mál, og so endaði dystuin við javnleiki. Tað var miðvallarspælarin Johann Vogel, sum tíðiliga í seinna hálvleiki fekk seinna gula kortið, og noyddist av vøllinum.

– Tað var ein harður dystur, men tað er ov tíðliga at siga, hvat úrslitið fer at merkja fyri okkum, segði Kobi Kuhn eftir dystin.



# Føroyingar til kick-boxing stevnu




*Jacob og Teitur vóru nakað eymir – men kortini væl nøgdir – eftir hørðu dystirnar í kappingini*

**Hetta vikuskiftið kappaðust Teitur Strøm og Jacob Øster Ejdesgaard í stórari stevnu í Malmö**

KICK-BOXING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Teir báðir ungu tvøradreingirnir skuldu um vikuskiftið royna seg í sterkari kapping, sum varð hildin í svenska stórbýnum.

Bjarni Hammer, sum er venjari hjá teimum báðum, sigur, at teir vistu undan kappingini, at talan fór at gerast um harðar dystir, tí reglurnar vóru sokallaðu full-contact. Men at tað gjørdist enn harðari enn væntað, tí dómararnir eisini loyvdu nýtslu av knøunum. Tað vil við øðrum orðum siga, at loyvt var bæði at sláa og sparka/nýta knø av fullari megi í royndunum at fáa mótstøðumannin niður.

Nógvir áskoðarar vóru á stevnuni, og Teitur var fyrri føroyingurin á pallin, tá hann skuldi dystast við ein svia. Leingi var Teitur væl við, men eftir at hann í øðrum umfari fekk knæið tvær ferðir í síðuna, megnaði hann ikki at koma fyri seg innan tey 10 sekundini, sum dómarin taldi, og so var hann úti úr kappingini.

Eisini Jacob skuldi royna seg móti einum svia, og her skuldi talan gerast um ein sera javnan dyst, har hvørgin parturin hevði givið seg, áðrenn tíðin var ferðin. Jacob gjørdi nógv um seg, og ikki færri enn fimm ferðir slongdi hann mótstøðumannin í gólvið, men tá stigini vórðu løgd saman, hevði sviin kortini tepran mun.

Teir báðir og venjarin, Bjarni Hammer, lata annars væl at kappingini, hóast talan bert gjørdist um ein dyst í part.

Sagt verður, at hóast blá eygu, so var talan um lærurika uppliving, og eisini eru teir longu nú bodnir til líknandi kappingar í Svøríki og Danmark.

Bjarni luttók annars í stórari kapping í Danmark í seinasta mánaði, og her eydnaðist honum at vinna seg fram til finaluna. Her var hann tó við undirlutan, tá dómararnir taldu stigini saman, men silvurmerkið vísir, at hann væl og virðiliga kann standa seg í krevjandi kappingargreini-ni.




*Bjarni Hammer í aktion í DM semifinaluni, sum hann vann uppá Knock-out. Bjarni hevur her pressað mótøðumannin upp í hornið*

## Skála á netinum

Tað eru nýggjar tíðir á Skála. Somikið nýggjar, at felagið ikki í fullan mun hevur megnað at fylgt við øllum tí, sum hoyrir einum oddaliði til, men í vikuni varð so enn eitt stig tikið rætta vegin.

Sum seinasta føroyska fyrstudeildarfelagið í fótbólti hevur Skála nevnliga eisini fingið sína egnu heimasíðu, og sum støðan er í løtuni, so er einki at ivast í, at hendan fer at verða væl vitjað.

Síðan er at finna á slóðini, www.skalaif.fo, og sum vanligt er á slíkum heimasíðum, so ber til at finna fram ymisk evni, sum hava við felagið at gera. Ennn er síðani ikki heilt liðug, men á Skála siga tey, at fleiri upplýsingar verða lagdar út í nærmastu framtíð.

**-jm**

## AB vann á tvørámonnum

**Spenningurin í aðru deild er í hæddini, eftir at AB basti oddaliðnum av Tvøroyri**

2. DEILD
*sportal.fo*
*terji@sosialurin.fo*

Spenningurin í 2. deild er stórur. Oddaliðið TB snávaði í dag, tá ið teir spældu truplan útidyst á Argjum. AB vann dystin 1-0 við einum máli, sum liðskiparin hjá argjamonnum, Rani Debes Christiansen, skoraði upp á beinleiðis hornaspark. Eitt mál, sum málverjin hjá tvørámonnum partvís noyðist at taka á sínar herðar.

Hvalbingar eru eisini væl við í oddastríðnum, eftir at teir vunnu 4-1 á B36 í Hvalba. Tað vóru annars gestirnir úr Havn, sum vóru á odda í hálvleikinum við einum máli, sum Bergur Midjord skoraði. Í seinna hálvleiki kom Royn meiri og meiri inn í dystin, og tá ið Gisli Sveinbjørnsson javnaði við brotssparki, kom vend í. Áleyparin Sasha gjørdi bart seinastu løtuna av dystinum og skoraði hattrick, soleiðis at Royn vann dystin 4-1, sum kanska var í meira lagi.

Á Valloyruni í Sandavági hevði FS Vágar á pappírinum ein lættan heimadyst, tá ið botnliðið KÍ var á vitjan. Klaksvíkingar vóru tó ikki so lættir at syfta, og teir løgdu seg eisini á odda 2-0 í fyrra hálvleiki. Vágamenn komu tó sterkt aftur, og tá ið brasiliumaðurin Silva legði heimaliðið á odda 4-2 í seinna hálvleiki, væntaðu tey flestu, at dysturin var avgjørdur, men so var ikki. Fyrst minkaði Alexandur Djordjevic um munin til 3-4, áðrenn Tórur Lervig við sínum næsta máli í dystinum javnaði til 4-4, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

Í Leirvík hittust LÍF og Sumba, og hesin dysturin endaði við einum málleysum javnleiki 0-0, og tað var á eini góðari leið, frætta vit úr Leirvík. Dysturin var ógvuliga tamur, og ikki vóru málmøguleikarnir nógvir.

Seinasti dysturin hetta vikuskiftið var í Vági sunnudagin, har B71 var á vitjan. Tann dysturin endaði 2-2.

### Úrslit

Royn-B36 4-1 (0-1)
0-1 Bergur Midjord
1-1 Gisli Sveinbjørnsson brts.
2-1 Sasha
3-1 Sasha
4-1 Sasha

**AB-TB 1-0 (1-0)**
1-0 Rani Debes Christiansen

**FS Vágar-KÍ 4-4 (1-2)**
0-1 Tórur Lervig
0-2 Gunnleif Biskopstø
1-2 Birgir Joensen
2-2 Sonny Johansen
3-2 John Johansen
4-2 Silva
4-3 Alexander Djordjevic
4-4 Tórur Lervig

**LÍF-Sumba 0-0**

**VB-B71 2-2 (**